# Gerast tilvitað um missión



Høvuðstalari á páskastevnuni verður Paul McIlwain úr Australia

**Samfelagsstevnan á Skálafjørðinum, sum verður á páskum, fer burturav fer at snúgva seg um missión**

**- Vit ynskja at tann einstaki limurin í samkomuni skal gerast meiri tilvitaður um missiónsvirksemi, sigur ein av stigtakarunum, Jens Olsen**

MØTIR
*Snorri Brend*

**Runavík:** Nú er nakað síðani, at umboð fyri tær fýra brøðrasamkomurnar á Skálafjørðinum – Nerija á Skála, Elim í Søldarfirði, Berøa í Saltangará og Nebo á Toftum – gjørdu av, at páskastevnan hesa ferð burturav skal snúgva seg um missión.

Málið er at kunna um, og harvið økja um tilvitanina í samkomum og millum einstaklingar um missión.

- Tað snýr seg sjálvandi um hjørtuni, og spurningurin fer at verða reistur, hvussu samkomur kunnu vera við til at styrkja um, og økja tann partin av samkomuvirkseminum, sum eigur at snúgva seg um trúboðan, sigur Jens Olsen.

Sum skilst verða onkrir av føroysku trúboðarunum, sum arbeiða uttanlands við á stevnuni.

Høvuðstalari verður Paul McIlwain úr Australia. Hann er ein av høvuðsábyrgdarmonnunum hjá New Tribes Mission í Australia.

Hann er somuleiðis limur í alheims aðalnevndini í felagsskapinum, har Óli á Grømma úr Klaksvík er formaður.

### Tjald við missión

Hetta er kortini ikki fyrsta stevnan av slíkum slagi í Runavík.

Í 2001 var stór missiónsframsýning í ítróttarhøllini í Runavík. Millum tjúgu og tredivu stovnar, felagsskapir og átøk, sum vóru sprottin av samkomuvirkseminum kring landið, sýndu fram.

- Fólk hildu hetta virka sum ein stórur íbirtari og kveikjari – bæði fyri tey, sum høvdu ábyrgd av tiltøkunum, og ikki minst hjá teimum sum vitjaðu, sigur Jens.

Hesa ferð verður eisini skipað fyri framsýning. Fyri seks árum síðani varð tað hildið vera harmuligt, at framsýningin var ov stutt opin. Tað komst av, at framsýningin og tiltøkini vóru í sama høli.

Hesa ferð hava fyrireikararnir leigað eitt stórt telt, sum verður sett upp við síðuna av ítróttarhøllini. Í teltinum verða fleiri at tiltøkunum, og tað fer at bera við sær, at tað verður møguleiki at geva sær góðar stundir at vitja framsýningina uttan at tað fer at órógva tiltøkini.

Serlig barna- og ungdómstiltøk eru fyriskipað, og fleiri sangkreftir fara at taka lut.

Framsýningin letur upp Skírisdag klokkan 16, og Símun í Túni fer at seta stevnuna sama dag klokkan 17.30. Tá fer sangbólkurin Salt at syngja.

Tey, sum manna bólkin, ið fyrireikar stevnuna, eru Jens Olsen, Anita Tausen, Dánial í Skemmuni, Jens Bech og Símin í Túni.


Lærlingur til
**Gamla Bókahandil**

**Søkt verður eftir lærlingi til bókahandil okkara at byrja skjótast til ber.**

Vit bjóða tær eitt áhugavert starv í einum hugnaligum umhvørvi við nógvum spennandi møguleikum.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at taka eina eyka hond í, tá á stendur.

Lærutíðin við HH er 2 ár og við FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum har tú verður við til at menna okkara nýumvælda handil.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**H. N. Jacobsens Bókahandil**
Postsmoga 55 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 36 · hnj@hnj.fo

H. N. Jacobsens
BÓKAHANDIL



www.husamekling.fo
Húsamekling
Keyp og søla av fastari ogn tel 31 93 21










Talan er um eini sera vælhildin sethús, sum eru í góðum standi, og standa frítt og væl fyri við blindveg í vesturbýnum. Vøkur natúr-græsplena er um húsið, og brotflísar eru lagdir á túnið. Útsýnið er sera gott, sólargangurin góður, og umhvørvið er friðarligt og barnavinarligt. Bilhús og hjallur hoyra til ognina.

**Adressa:** ....Heygsvegur 48, 100 Tórshavn
**Stødd á húsum:** ....126 m² x 2 + hjall og bilhús
**Stødd á grundøki:** ....806 m²
**Byggiár:** ....1983
**Kostnaður:** ....Hóskandi boð ynskist

Áhugað verða biðin um at ringja 319321 ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling. Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.